## Síðsti dagur bókað verður á fíggjarárið 2021

Stovnarnir verða mintir á, at mánadagin 21. februar 2022 er seinasti dagur, ið stovnar kunnu bóka kreditorskjøl á fíggjarárið 2021, og seinasta lønarkoyringin fyri fíggjarárið 2021 verður hósdagin 17. februar 2022.

Neyðugt er tí, at lønarskjøl viðvíkjandi fíggjarárinum 2021 at avgreiða eru Gjaldstovuni í hendi í seinasta lagi **mikudag 16. februar 2022** og kreditorskjøl viðvíkjandi fíggjarárinum 2021 miku**dag 16. februar 2022**. Sama dag  verður debitormodulið fyri 2021 stongt, so stovnarnir hava møguleika at avgreiða tær rokningar, tey hava móttikið.

Gjaldstovan fer, regluliga, fram til 21. februar 2022 at minna á hesa freist.

Undir "Ársroknskapurin 2021" liggur t.d. skjalið "Tíðaravmarkan av útreiðslum í ársroknskapinum 2021", sum hevur áhuga hjá teimum, sum vita, at ein útreiðsla skal bókast á 2021, men rokningin er ikki stovninum í hendi fyri 16. februar 2022.